# Sands Kommuna keypti køtt í sekki

**Uttan at tryggja sær, at ætlanin varð veruleiki, keypti Sands Kommuna eini sethús á Sandi fyri knappliga hálvaðru millión at brúka til almenna umsiting, sum landsstýrismaðurin við almannamálum segði teimum, at hann ætlaði at flyta til Sands**

HÚSAKEYP

*Edvard Joensen*



*Sands Kommuna hevur keypt eini sethús á Sandi fyri knappa hálvaðru millión krónur upp á væntaða inntøku frá Almannastovuni. Borgarstjórin, sum var, tá húsini vórðu keypt, viðgongur, at tað helst var eitt mistak ikki at tryggja sær inntøkuna fyrst, tí keypið tyngir nú kommununa fíggjarliga*

Sands Kommuna hevur forkeypt seg, tá eini hús vórðu keypt til væntaðar inntøkur, sum táverandi landsstýrismaðurin við almannamálum hevði boðað borgarstjóranum frá, skuldu flyta til Sands, sigur borgarstjórin, sum var, tá húsini vórðu keypt. Núverandi borgarstjórin, sum tá var landsstýrismaður, heldur ikki, at húsini nýtast at standa tóm, hóast eingin deild hjá Almannastovuni flytir til Sands beint nú.

Seinasta heyst keypti Sands Kommuna eini stór sethús á Sandi. Húsini skuldu brúkast til ymiskar tænastur hjá kommununi so sum kommunuskrivstovu, kunningarstovu, bókasavn og annað. Umframt var so ætlanin, at helvtin skuldi leigast út til at hýsa eini økisdeild hjá almannastovuni, har eini fýra - seks fólk skuldu arbeiða.

Hendan ætlanin var komin í lag, eftir at borgarstjórin á Sandi og landsstýrismaðurin við almannamálum høvdu tosað saman.

Jóan Petur í Soylu, táverandi borgatrstjóri á Sandi, váttar at húsini lutvíst vórðu keypt upp á væntaða inntøku, eftir at Páll á Reynatúgvu, táveradi landsstýrismaður við almannamálum, hevði sagt honum frá, at landsstýrismaðurin arbeiddi við at flyta ein part av umsitingini hjá Almannastovuni til Sands.

Jóan Petur í Soylu viðgongur í dag, at kommunan helst hevur keypt eini ov dýr og ov stór hús uttan at tryggja sær ta neyðugu inntøkuna, sum skal gjalda húsini afur.

Húsini kostaðu 1,4 millión krónur. Tey eru í tveimum hæddum upp á umleið 200 fermetrar hvør. Sum er stendur umleið helvtin av húsunum tóm, og bygdarráðið má nú leita eftir onkrum, sum er áhugaður at sleppa inn, sigur hann.

Sands Kommuna hevur goldið húsini, sigur Jóan Petur í Soylu. Hóast kommunan eigur nakað av pengi innistandandi, er tað greitt, at tað tyngir kommununa fíggjarliga. Sands Kommuna hevur í ár eina góða millión í halli á fíggjarætlanini. Og útlitini eru ikki ov bjørt, sigur hann. Bæði fólkatal og inntøka eru minkandi í løtuni.

## Ókent mál

Í Almannað- og Heilsumálaráðnum kenna tey als einki til at talan skal vera um at flyta nakra deild hjá Almannastovuni til Sands.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at honum kunnugt er eingin slík ætlan. Eingin liggur á hansara borði, og eftir at hava kannað málið hjá embætismonnunum, sigur hann, at har er eingin, sum veit um slíka ætlan yvirhøvur.

– Eg kann so siga, at í løtuni er einki, sum verður gjørt her í húsinum, sum bendir á nakra slíka ætlan, sigur landsstýrismaðuri við almanna- og heilsumálum.

Stjórin á almannastovuni, Petra J. Joensen, sigur, at tankin um at stovna eina økisdeild hjá Almannastovuni á Sandi, hevur verið havdur á lofti, men at einki ítøkiligt hevur verið frammi kortini.

– Tað er soleiðis, sigur hon, at nýggi bygnaðurin hjá Almannastovuni leggur upp til, at økisdeildir kunnu setast á stovn kring landið. Og Sandoyggin og Vágar hava so verið nevndar í hesum sambandi, tí har hevur Almannastovan onga deild, sum er.

Søkt varð á fíggjarlógini fyri 2002 um at fáa fígging til deild í Vágum, men tað varð ikki til nakað.

Um ætlanina um deild á Sandi, sigur hon, at málið hevur verið vent saman við táverandi landsstýrismanninum og táverandi aðalstjóranum í Almannamálaráðnum. Aðalstjórin er síðan farin í annað starv, eins og landsstýrismaðurin eisini er farin úr starvi.

Almannastjórin leggur dent á, at als einki ítøkiligt var í teirri ætlanini, sum nevnd varð.

## Møguleikin var har

Sambært nýggja bygnaðin hjá almannastovuni er møguligt hjá stovninum at lata upp nýggjar økisdeildir, um hann hevur politiskan uppbakning, sigur Páll á Reynatúgvu, fyrrverandi landsstýrismaður við almannamálum.

Í hesum føinum tók landsstýrismaðurin undir við ætlanini, sigur hann.

Hann sigur, at hann ætlaði at fáa tvær nýggjar økisdeildir hjá Almannastovuni. Eina í Vágum og eina á Sandi. Men tann ætlanin, hann arbeiddi við, datt niðurfyri, tá valið varð útskrivað, og hann sjálvur frákoyrdur, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann leggur dent á, at tað hevði ikki verið nakar meirkostnaður fyri Almannastovuna, at fingið hesar deildirnar afturat. Tí í miðstaðarøkinum hevði kortini verið neyðugt at gjørt nýggjan leigusáttmála hjá stovninum, og fólkini høvdu verið tey somu. So tað hevði gingið upp.

Páll á Reynatúgvu er nú aftur borgarstjóri á Sandi og skal tískil fáa avsett húsini, Sands Kommuna hevur keypt.

Hann metir ikki, at tað fer at verða nakar trupulleiki at fáa leigað tann partin av húsunum, sum Sands Kommuna sjálv ikki nýtir, út.

– Tað eru fleiri, sum hava víst áhuga fyri at sleppa inn, sigur hann. So húsini skulu nokk verða nýtt, hóast Almannastovan ikki flytir suður. Men tann møguleikin var har, tá húsini vórðu keypt, sigur hann.

# Hugnaløta í Sandavági

**Sandavágs Ítróttarfelag skipar leygarkvøldið fyri hugnaløtu við fyrilestri, felagssangi, sangframførslu , skemti og burturluting**

HUNGALØTA

SÍF húsið verður karmur um hugnaløtu leygarkvøldið klokkan.

Tá verður bæði fyrilestur, sangur, skemt av ymsum slagi og felagssangur á skránni, eins og kaffi við teimum viðgitnu lagkøkunum i Sandavági eisini verður at fáa.

Jógvan Fríðriksson, prestur, fer at hava innlegg um lívsvirði, siga fyrireikararnir. Sangframførsluni fer bólkurin »Bjørn Ingars« at standa fyri. Men tey, sum koma til tiltakið, sleppa eisini at nýta røddina, tí felagssangur verður, sum vanligt plagar at vera til slík tiltøk i SÍF húsinum.

Okkurt skemtiligt undirhald skal eisini vera við, siga tey, sum stíla fyri. Burturlutað verður eitt lamb, sum fæst í heyst.

Tiltakið byrjar leygarkvøldið klokkan 19.30, og atgongumerkið kostar 50,- krónur.

**ej**





# Stuðla føroyingum so langt sum til ber

**Danski uttanríkisráðharrin váttar, at stjórnin er sinnað at stuðla føroyingum í royndunum at fáa størri ávirkan á okkara egnu uttanríkisviðurskifti**

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Danska stjórnin fer at stuðla føroyingum so langt tað ber til í royndunum at lata okkum fáa størri ábyrgd av, og størri ávirkan á okkara egnu uttanríkisviðurskifti.

Tað váttaði danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, fyri Jóannesi Eidesgaard, Løgmanni, á óformligum fundi teirra millum mikumorgunin.

Fyrsta uttanlandsferðin hjá Jóannesi Eidesgaard, eftir at hann varð valdur til Løgmann, gekk til Keypmannahavnar at hitta danska forsætisráðharran.

Og nú Løgmaður kortini var í Danmark, nýttti danski uttanríkisráðharrin høvið til at bjóða honum inn á gólvið.

Teir báðir kennast væl, frá tíðini, Jóannes Eidesgaard varð fólkatingsmaður. Tá høvdu hann og Per Stig Møller skrivstovu at kalla hurð um hurð á Kristiansborg og har hittust teir ofta og komu at kennast rættiliga væl.

– Talan var ikki um ein formligan fund við Per Stig Møller. Talan var um eina kurteisisvitjan, sum tað eitur á nýføroyskum politiskum máli og talan var sostatt heldur ikki um nakra fasta dagsskrá, sigur Løgmaður, nú hann er afturkomin.

Hann sigur, at sostatt nýtti hann høvi til at práta við uttanríkisráðharran um leyst og fast tann tíman, hann var inni hjá ráðharranum.

– Eg greiddi honum fyrst frá fundinum við Anders Fogh Rasmussen. Serliga greiddi eg honum fær tí, vit høvdu tosað um at lata Føroyum og Grønlandi størri ávirkan á tey uttanríkisligu viðurskiftini, sum viðvíkja hesum báðum pørtunum í ríkinum.

Løgmaður sigur, at hann fekk tilsøgn frá Per Stig Møller um, at so langt sum tað yvirhøvur ber til, fer danska stjórnin at stuðla føroyska ynskinum um størri ávirkan á egin uttanríkisviðurskifti.

Men markið liggur við donsku grundlógina, tí hana vilja danir ikki koma í stríð. Men í øllum málum var hann sinnaður til at gera sítt til, at finna skilagóðar loysnir.

Eitt nú merkir tað, at vit kunnu ikki fáa heimild til at gera sáttmálar við onnur lond, tí har skal tað vera ríkið, sum ger slíkar sáttmálar. Eitt dømi um tað er, tá ið sáttmálin varð gjørdur við bretar um markið ímillum bæði londini.

– Hóast tað vóru føroyingar, sum gjørdu alt tað fyrireikandi arbeiði og samráddust, var tað kortini ríkið, sum ábyrgdaðist.

Jóannes Eidesgaard sigur, at í uttanríkispolitikki gongur rákið tann vegin, at heimildirnar verða fluttar frá teimum ymsu stjórnunum og lagdar yvir í altjóða felagsskapir av ymsum slagi.

– Tí er tað avgjørt neyðugt, at vit føroyingar fáa beinleiðis høvi til at ávirka tær uttanríkispolitisku avgerðir, sum verða tiknar og sum hava týdning fyri Føroyar.

Løgmaður vísir eisini á, at í ymsum altjóða fiskivinnufelagskapum, sum vit eru í, eru vit umboðaðir saman við grønlendingum.

– Tað er ikki serliga heppið, tí tað er ikki altíð, at føroyingar og grønlendingar hava samanfellandi sjónarmið um ymisk mál. Í hesum sambandi kundu føroyingar avgjørt hugsa sær at fingið eina meiri óhefta umboðan.



*Jóannes Eidesgaard og Per Stig Møller í Keypmannahavn mikudagin. Danski uttanríkisráðharrin lovar at stuðla føroyingum so langt, sum tilber*

www.reyniservice.fo
TOYOTA

**Reyni Service og Toyota Klaksvík**

Vegna plásstrot lata vit 10.000 krónur
í avsláttri av øllum brúktum bilum
yvir 40.000 krónur, tá eingin
bilur er í býti. Í samband við útsøluna
hava vit opið leygardagin 20. mars
í Havn: frá kl. 10.00 - 16.00
í Klaksvík: frá kl. 10.00 - 14.00

Toyota í Føroyum
REYNI SERVICE
Tlf. 353040 - Fax 353041
www.reyniservice.fo